# HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið á ymiskan hátt gjørdu brúdleypsdag okkara 1. mai 2004, hugnaligan og minnisríkan. Takk fyri gávur, blómur og mangar heilsanir og takk økk tit mongu, ið gjørdu okkum brúdleypsveitsluna ógloymandi. Takk øll tit, ið hvør í sínum lagi fyrireikaðu og løgdu alt so væl til rættis frá fyrst til síðst.
**Lív og Henry**



Hjartaliga tillukku við degnum tit bæði. **Heilsan vit á Argjum**



**Góða Sunneva**
Hjartaliga tillukku við degnum og ein heilsan til hinar á myndini, sum eru og blíva 18 ár. Eru vit ikki fittar og smartar her.
**Ynskja mamma, babba og beiggi**



**Góði bróður og sonur**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 24. Gud signi framtíð tína.
**Ynskir Pauli, Fróði, Torkil og foreldur**



Hvør skuldi trúð tí, at henda fitta diddan verður 40. Hjartaliga tillukku 22. aug., frá
**Mammu, pabba og beiggjunum**



**Hey frk. Myllhamar**
Tillukku við at nú er tú vorðin stór. Ver nú so røsk í Skálabúðini og ikki klandrast við systir tína.



**Góða Sunneva**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum og góða eydnu við koyrikortinum. Alt tað besta.
**Bestu ynskir DK-systir**



**Góði elskaði Búgvi**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum.
**Ynskja Mamma, babba og Silja**



**Góða Asta**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum tann 21. Alt tað besta í framtíðini. Jesus pápi signi framtíð tína. Takk fyri tann góða túrin.
**Heilsan hin hatturin**



**Hey lekra systir**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum. Um tit ynskja at hitta hana, so stendur hon í Skálabúðini við ongum tonnum frá 9-18.
**Bestu ynskir frá Vivi og Ken**



**Góði Hjalti**
Hjartaliga tillukku við 30 ára føðingardegnum 24.
**Ynskir mostir á Hamri við familju**


## AWI 33 TIL SØLU



**Báturin er klárur til fiskiskap**

***Tlf. 443091***


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:......................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ....................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Í dag kl. 15 Bønarmøti.
Leygardagin kl. 11 Útimøti – um viðrar.
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 Familjumøti har skótarnir skipa fyri. EKKO frá Noregstúrinum, drekkamunnur aftaná. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.

**Meinigheitshúsið**
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 9.30-12 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Ejvind Mouritsen, Gratia syngur.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Fríggjadag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 8 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Pater Tuomo Vimpari í Mariukirkjuni. Talvan gongur fyri hjálparfelagsskapin Caritas Denmark.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Verið her og vakið við mær, vakið og biðið«.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið møtir. Ung frá 13 ár og uppeftir eru vælkomin við.
**Havnar KFUM-skótar møta soleiðis:**
Skótar 5.-7. fl. mánakvøld kl. 19-21.
Ungdómsskótar 8. fl. og eldri týskvøld kl. 19.30.
Spírur føddar 1997 og 98 og Títlingar 2.-4. fl. mikudag kl. 16.30. www.scout.fo/kfuk

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Símin Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Fríðtór Debes, evnið er: Trúgv (yvirhøvur) 1. partur, kl. 16 Samkomufundur, kl. 22 Útimøti á vaglinum.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mán-frí frá kl. 8-16.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Frá Ebenezer**
Mikudagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 21 Teen-Night. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími, Mogens Tilsted Christensen, Opb. 7.

**Saron, Vestmanna**
Onki útimøti í kvøld, vegna luttøku í Eysturoynni.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við luttakarum frá »TeenStreet«.
Sunnudagin kl. 18 Møti við Paula Høj. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Bønarmøti verður í kvøld kl. 19. Um viðrar verður útimøti á Hellunum í kvøld kl. 20.30.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Pola Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Jógvan Jacobsen og Klæmint Eliasen tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Mikukvøldið bíbliutími kl. 20.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.
Týskvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.

**KFUM & K, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Jóhann Henriksen.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Aksel Zakariassen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Hjalgrím Davidsen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími. Áps. 5. kap.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 23. august*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Ítriv
kl. 10-18 Seymafýrkantar saman til teppir. Myndaveging á loftinum.
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
**Túrur til Kaldbak 25. aug. kl. 14. Úr Steinatúni við bussi til Kaldbak, síðani eftir bygdavegnum niðan á Brúna- og Stóravatn**
*Týsdagin 24. august*
kl. 10-11.30 Sangur,Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Útoyggjaprát, Rodmundur í Liða
*Mikudagin 25. august*
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14 Túrur til Kaldbak 25. aug. kl. 14. Úr Steinatúni við bussi til Kaldbak, síðani verður gingið eftir bygdavegnum niðan á Brúna- og Stóravatn
*Hósdagin 26. august*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 27. august*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Frá Eysturoyar Gongufelag**
Farið verður til Hetlands hósdagin 16. september og komið verður aftur mánadagin 20. september. Kostnaður íroknað ferðing og gisting: Í 4 koyggjukamar umborð á Norrønu + 2 nætur á hotel í Lervick (Hotel Shetland, Grand Hotel ella Queens Hotel) í dupult kamar kr. 1500 (einkult kamar á hotellinum 250 kr. eyka pr. nátt). Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni innan hósdagin 2. september, Runavík tlf. 449449 infoey-r@post.olivant.fo og Fuglafjørður tlf. 444860 infoey-f@post.olivant.fo

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.acadanmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Heilafelagið**
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Føroyskir Mærsk Siglarar**
*Grønlandsvegur 58, 100 Tórshavn*
Frítíðarfelag, hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, ið starvast hjá A. P. Møller – Mærsk A/S. Tilmeldingarskjal fæst við at venda sær til felagið á tlf. 590100 ella um teldupost: aldebaran@kallnet.fo

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

## BRÚDLEYP

Fríggjadagin 27. august kl. 15.00 giftast í Hellerup Kirke Cecilla Skou og Jógvan Heinesen. Brúdleypið verður hildið í Føroyingahúsinum, Vesterbrogade 17A, Keypmannahavn.

## 70 ÁR

Hósdagin 26. august verður Kristina Bech, Þorkeri 70 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 28. august.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Mikudagin 25.08. kl. $19^{45}$
Mikudagin 25.08. kl. $22^{15}$
Hósdagin 26.08. kl. $19^{45}$
Hósdagin 26.08. kl. $22^{15}$




Mikudagin 25.08. kl. $22^{45}$
Hósdagin 26.08. kl. $22^{45}$




**Við danskari talu**
Mikudagin 25.08. kl. $17^{30}$
Hósdagin 26.08. kl. $17^{30}$
**Við enskari talu**
Mikudagin 25.08. kl. $20^{45}$
Hósdagin 26.08. kl. $20^{45}$




Mikudagin 25.08. kl. $18^{00}$
Hósdagin 26.08. kl. $18^{00}$
*– Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning fríggjadagin 27.08**




**Frumsýning fríggjadagin 27.08**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**